11 DAGAR Løgtingsvalið 2008

LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Fiskidagabanki



Val X

DAN R. PETERSEN
javnaðarmaður
www.danrpetersen.com

Javnaðarflokkurin og sjálvstýrisflokkurin eru samdir um at seta fiskidagabanka á stovn. Men motivini hjá flokkunum eru ymisk. Sjálvstýrisfl. vil kráma inntøkur til landskassan, meðan javnaðarfl. vil lætta um raksturin hjá skipum, tí flotin ikki longur klárar hesi dýru fiskiloyvir, sum bert gagna fyrrverandi reiðarum.

Verða loyvini loyst frá skipum við sølu ella fallittum, sum heilt givið fara at koma., fáa skipini aftur sítt sanna virði. Reiðarin fær ein lættari rakstur, hýrurnar kunnu fara upp, og sjómenn fáa eina sømiliga pensjón.

**Tað er hendan politikkin undirritaði vil virka fyri.**

# Frælsi – lykilin til framtíðina



Val X

HEIDI PETERSEN
Tjóðveldisflokkurin

**Tjóðarfrælsi**
Tann dagurin er komin, har vit í Føroyum skulu gera upp við okkum sjálvi um vit vilja nýta tann lykil til framtíðina vit standa við í hondini. Tora vit at seta hann í lyklarholið, snara honum á og opna dyrnar til heimin.

Tjóðveldi vísir vegin til hetta frælsi við at biðja Føroya fólk koma á fólkaatkvøðu um eina Føroyska grundlóg longu í 2008/2009.

Vit vilja skipa Búskapargrunn Føroya beinanvegin og umvegis grunnin minka heildarveitingin úr Danmark við í minsta lagi 80 mió. kr. um árið, til hon er burtur.

Áðrenn valskeiði er runnið, verða samráðingar við donsku stjórnina um framtíðar samstarv og felags fráboðan til altjóða samfelagið um føroyska sjálvstøðu. Fólkaatkvøða um Føroyska sjálvstøðu verður skipað.

**X við E Heidi P**
**Les meira á www.tjodveldi.fo/heidi**

# Til kringvarpsstjóran, ella rætta viðkomandi



Val X

MAUD WANG HANSEN
Tjóðveldi

Fyrst vil eg ynskja eitt gott nýggjár og takka fyri ein góðan fund í læraraskúlauluni leygarkvøldið.

Eg vil tó viðmerkja, at eg bleiv sera hørm um at vera vitni til, at Hans Birgir Hansen bleiv ignoreraður av fyriskiparnum. Hann bað um at sleppa at seta ein spurning til ein av formonnunum og greiddi frá, hvat hann vildi spyrja um. Spurningurin var rættaður til Høgna Hoydal og snúði seg um rættartrygd.

Hans Birgir er borgari eins og tú og eg, og hann hevur sama rætt sum tú og eg at virka í fólkaræðisliga rúminum. Fjølmiðlafólk eiga at duga at taka betri støðu til, hvat tey gera í einari beinleiðis sending.

Eg sat unidr liðuni á Hans Birgir og sá tí, hvat fór fram, og eg vil enn einaferð viðmerkja, at eg haldi tað var skeivt at ignorera hann, og at hetta ikki eigur at koma fyri aftur. Hann átti at fingið eina umbering.

# Come on, virðið dansin



Val X

JÓNLEIF JOHANNESEN
Valevni hjá Javnaðarflokkinum

**"kvæðini eru ein meginkelda í arbeiðinum at menna føroyskt skriftmál."So stendur at lesa í álitinum um almennan málpolitikk "Málmørk"**

Her sæst týdningurin, sum kvæðini hava fyri mál og samleika okkara. Alt ov lítið hevur verið gjørt fyri at bjarga kvæðaskaldskapinum sum eina livandi mentan. Hetta vil Javnaðarflokkurin bøta um.

**Mentamálaráðið**
Mentamálaráðið eigur í størri mun at taka ábyrd av økinum og skapa rammur, so at meginkeldan at mennna føroyskt skriftmál ikki tornar. Her hugsi eg eina mest um skúlaøkið og dansifeløgini. Mentamálaráðið eigur at bera so í bandi, at allir næmingar fólkaskúlans koma at hava eina góða kvæðaupplivingi. Á henda hátt kunnu teir seinni í lívinum velja at verða virkin í føroyskum dansi ella ikki. Vit skulu ikki øll verða kvæðakempur, men vit eiga øll at hava henda møguleikan. Hesin møguleiki er í dansifeløgunum. Dansifeløgini eiga tí at fáa betri kor enn tey hava í dag.

**Í skúlanum**
Síðst í hálfemsinum eydnaðist tað at fáa føroyskan dans og kvæðir inn um skúlagátt. Hetta var eitt munandi framstig, men hyggja vit at støðuni í dag, er hon ikki so bjørt. Tað er ov lítið av undirvísingtilfarið um evnið. Javnaðarflokkurin vil arbeiða soleiðis, at vit fáa gott undirvísingartilfar um kvæðir og føroyskan dans. Allir næmingar fólkaskúlans skulu fáa eina góða kvæðaundirvísing.

**Dansifeløgini**
Tey síðstu hálvthundra árini hava dansifeløgini kring landi hildið lív í dansinum. Hesi feløg eiga at fáa nógv størri stuðul enn í verandi løtu. Feløgini eiga at verða stuðla soleiðis, at tey megna at styrkja kvæðini og dansin, at geva út fløgur, hjálpa skúlunum, hjálpa ferðavinnuni, knýta menturnarbond kring heimin og so víðari.

Javnaðarflokkurin vil arbeiða fyri at kvæðamentan okkara, sum er so týdningarmikil fyri samleika og mál føroyinga, fær nógv betri umstøður at yvirliva sum ein livandi og gevandi mentan.

# Halló – er onkur inni??



Val X

BJØRT SAMUELSEN
Tjóðveldi

Umhvørvið - veðurlagsbroytingar, at avmarka CO2-útlát og leggja um til varandi orku - er heitasta politiska sak kring heimin í løtuni. Men hóast heimspressan viðgerð tað dagliga og bæði Bill Clinton og Hans Blix hava verið her við júst hesum sama boðskapi, so er umhvørvið als ikki tema í føroyska valstríðnum. Tað kennist sum at sláa í eina dýnu at fáa reist hetta kjak.

Hetta hóast veðurlagsbroytingar sanniliga eisini ávirka okkum, og hóast høgir oljuprísir fara at gera tað sera trupult fyri bæði vinnuna og húsarhaldini í allar nærmastu framtíð. Vit mugu taka ábyrgd og kjakast um, hvussu vit:

Leggja um til reina orku í vinnuni og húsarhaldum.

Seta krøv um, at allir nýbygningar fylgja byggisamstyktum um orkunýtslu.

Seta mál fyri umlegging frá dálkandi til varandi orku.

Gerast partar av tilbúgving í Norðuratlantshavi.

Hvussu vit flyta Føroyar yvir í lágorkubúskap.

Harumframt mugu vit binda okkum til altjóða sáttmálar og - ikki minst - vísa á Føroyar sum royndar- og granskingarøki fyri grønari tøkni og varandi orkukeldum.

Hetta snýr seg um kappingarførið hjá okkara vinnu. Hetta snýr seg um búskapin hjá landi okkara. Hetta snýr seg um vælferðina hjá tær, mær og børnum okkara!

# John Johannesen brúkar gamalt, óloyst valagn umaftur



Val X

INGEBORG GODTFRED
Tjóðveldi

**Ætlaði mær ikki í blaðkjak, men kann snøgt sagt ikki lata vera við at koma við eini viðmerking til valgreinina hjá John Johannesen, sum hann kallar "Endurnýggja sjúkrakassan."**

Eg vóni ikki, at føroyingar eru so pillbýttir, sum Jógvan Ósá vil vera við, at teir nú enn einaferð hoppa upp í vognin hjá John Johannesen, nú hann aftur lovar broyting í sjúkrakassaviðurskiftunum. Sama valagn brúkti hann eisini til seinasta val. John, gott nokk eru vit tilkomin fólk, men enn ikki so gloymsk, at vit ikki minnast, at tú engdi við sama sjúkrakassa-agni fyri fýra árum síðani.

Tit hava í farna valskeiði havt tey bestu kortini á hondini til at gera broytingina, men eisini har bangaði Fólkaflokkurin tykkum upp á pláss.

Øll onnur lond kring okkum hava aðrar sjúkratryggingar, hvørja vit skulu velja, havi eg ikki nakað endaligt boð upp á, tí tað má kannast.

At enda, tað er at frøast yvir, at Kári Petersen eisini hevur sæð ljósið viðvíkjandi veiðiloyvunum. Hendan skeivleika hevur Tjóðveldi átalað óteljandi ferðir.

**Gott nýggjár góðu føroyingar**